# Lige børn leger bedst

JOHAN DAHL
Løgtingsmaður



**– men er fiskiveiðu avtalan millum Ísland og Føroyar eins góð fyri báðar partar?**

Við Íslandssáttmálanum varð stríðst fyri at fáa hendan at venda rætt og vil tíðin so einans vísa, um tað eydnaðist okkum.

Undir nevndarviðgerðini av Íslandssáttmálanum (sum enn ikki er ígildissettur) varð m.a. fisikivinnuavtalan eisini drigin inn í diskussiónina, hóast hon ikki er ein partur av hesi, men neyðugt var, at leggja dent á, at hendan í framtíðini kom at geva báðum pørtum eins góðar sømdir, tí so er ikki í løtuni.

Tað vil so eisini bert tíðin vísa , men í verandi løtu er javnvágin als ikki til staðar fyri okkara viðkomandi.

## Er javnvág í avtaluni?

Vit hava í mong ár havt fiskivinnuavtalu við Ísland, sum hevur verið hildin at verið í lagið, hetta hóast at tá fiskimarkið bleiv flutt út og føroyingar mótvegis onglendingum bakkaðu fult upp um hetta mál , so skuldu føroyingar vísandi til søguligu rættindi okkara, hava eina góða avtalu um botnfiskin.

Mær er fortalt at vit tá veiddu uml. 18.000 tonsum um árið av botnfiski í íslendskum sjógvi, men hetta kann ivaleyst skjalprógvast betur av fiskiveiðumyndugleikum okkara um teir hyggja at søguligum tølum og harvið vísan gongdina seinastu 20-25 árini.

Vit eru síðan tá krympaðir ikki sørt í veiðumongd.

Eftir at avtalað varð millum Føroyar og Ísland at svartkjaftur og sild kunnu veiðast óavmarkað inni á økjum hjá hvørjum øðrum, er stóri spurningurin um hendan avtalað nú er so í lagið sum vit halda fyri okkara viðkomandi?

Hyggja vit at avtaluni um felags veiðurættindi hvør hjá øðrum í uppisjóvarfiskivinnuni, so er rímiliga lætt at síggja at her er ein stórur skeivleiki til staðar.

Fyri tað fyrsta so kunnu vit ikki enn veiða til matna av lodnu og øðrum pelagiskum fiskasløgum í íslendskum sjógvi og landað hesi í Føroyum til virkingar. Ei heldur kunnu okkara framleiðsluuppisjóvarskip veiða í íslendskum sjógvi og framleiða veiðuna umborð til matna og harvið økja um veiðuvirði.

Íslendingar hinvegin hava seinastu árini fingið sær fleiri uppisjóvar verksmiðjutrolarar og kunnu veiða í okkara økið og framleiða umborð til matna.

Ein kann spyrja hvar er logikkurin við at gera ein slíka “skeiva” skipan?.

## Íslendska uppisjóvarvinnan og lyftini hjá Halldóri Ásgrímssyni

Í íslendsku vinnuni frættist, er stór ónøgd við at Fyrrv. forsætisráðharrin Halldór Ásgrímsson hevur lovað undir vitjan síni í Føroyum, at føroysk skip skulu kunna hava hesar somu sømdir í íslendskum sjógvi , so har er neyvan seinasti leikur telvdur enn, men vónandi verður sum lovað bleiv.

## Veiðumongdirnar hjá hvørjum øðrum frá 2004 til og við 2006 eru hesar:

Higartil í ár sum sæst so hava íslendingar veitt umleið 200.000 tons av svartkjafti í okkara sjógvi.

Um vit siga at av hesi nøgd eru 30.000 veidd av framleiðslutrolarum so er søluvirði av hesum uml. 65. mió. krónur .

Hini 160.000 tonsini verða seld fyri í meðal Kr. 1,10 pr. kg. Og svarar tað til 176 mió. krónur.

Hetta gevur eitt virði uppá 225 mió. krónur bert av svartkjaftinum.

Um vit umroknað alla veiðuna til feskafiskaveiðuvirði, so er myndin sum niðanfyri víst.

Svarkjaftaprísurin er her ásettur við mettum meðal fiskamjølsprísum.

Um vit ikki fáa hesi viðurskiftiavgreiddíkomandi samráðingum so verður sáttmálin alt meira og meira skeivur – til fyrimuns íslendinga, tí tað er avmarkað hvat vit koma at veiða av svartkjafti og sild í íslendskum økið , meðan væntast kann at stórt sæð øll teirra veiða eftir svartkjafti og fyri ein part eisini norðhavssild verður í okkara øki - eisini til matna.

Um ikki fæst skil uppá at tann svartkjaftur, sild og lodna sum føroysk skip veiða í íslendskum sjógvi eisini kann landast til matna tá hetta er gjørligt – eisini í Føroyum, so er trupulleikin uppaftur størri fyri okkum.

## Botnfiskakvotan okkara eigur at verða størri

Vit eiga at fáa størri toska og aðra botnfiskakvotu til okkara skip í íslendskum sjógvi

havandi í hugað omanfyri nevnda, og her hugsið er serliga um okkara djúpvatnstrolaraflota sum skuldi fingið betur rættindi í íslendskum sjógvi.

Lige børn leger bedst sigur orðatakið, men her sær ikki út til ,at tað sum við Íslandssáttmálanum skuldi gera at hesi hava eins sømdir hvør hjá øðrum er til staðar fyri Føroya viðkomandi , - ikki enn í hvussu er.

Vónandi vaknar onkur og fer í holt við at fáa greiði á hesum viðurskiftum so verulig javnvág verður í avtaluni.

Karup 06.07.2006

**Veiðumongdirnar hjá hvørjum øðrum frá 2004 til og við 2006 eru hesar:**

**Føroysk veiða í íslendskum sjógvi.**

| | Toskur | | Annar botnfiskur | | Lodna | | Norðurhavssild | | Svartkjaftur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Kvota | Veiða | Kvota | Veiða | Kvota | Veiða | Kvota | Veiða | Kvota | Veiða |
| **2004** | 1.200 | 1.231 | 4.400 | 3.868 | 30.000 | 30.170 | Ikki ásett | 0 | Ikki ásett | 74.102 |
| **2005** | 1.200 | 1.190 | 4.400 | 3.933 | 30.000 | 18.620 | Ikki ásett | 5.270 | Ikki ásett | 31.590 |
| **2006** | 1.200 | 416 | 4.400 | 1.548 | 30.000 | 29.560 | Ikki ásett | 6.771 | Ikki ásett | 510 |

**Íslendsk veiða í føroyskum sjógvi**

| | Svartkjaftur | | Sild | | Makrelur | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Kvota | Veiða | Kvota | Veiða | Kvota | Veiða |
| **2004** | ongin | 99.540 | | 0 | 1.300 | 0 |
| **2005** | ongin | 171.095 | | 4.153 | 1.300 | 0 |
| **2006** | sí viðm. | 196.980 | | 4.956 | 1.300 | 0 |

**Føroysk veiða í íslendskum sjógvi:**

| | Toskur | | Annar botnfiskur | | Lodna | | Norðurhavssild | | Svartkjaftur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Veiða | Virði | Veiða | Virði | Veiða | Virði | Veiða | Virði | Veiða | Virði |
| | | mió. kr. | | mió. kr. | | mió. kr. | | mió. kr. | | mió. kr. |
| **2004** | 1.231 | 22 | 3.868 | 39 | 30.170 | 30 | 0 | 0 | 74.102 | 59 |
| **2005** | 1.190 | 21 | 3.933 | 39 | 18.620 | 19 | 5.270 | 11 | 31.590 | 25 |
| **2006** | 416 | 7 | 1.548 | 15 | 29.560 | 30 | 6.771 | 14 | 510 | 1 |

**Íslendsk veiða í føroyskum sjógvi:**

| | Svartkjaftur | | Sild | | Makrelur | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Veiða | Virði | Veiða | Virði | Veiða | Virði |
| | | mió. kr. | | mió. kr. | | mió. kr. |
| **2004** | 99.540 | 80 | 0 | 0 | 0 | |
| **2005** | 171.095 | 137 | 4.153 | 8 | 0 | |
| **2006** | 196.980 | 217 | 4.956 | 10 | 0 | |

**Munur í veiðuvirði:**

| Veiðuvirðir | Ísland í Fø. Øki | Føroyar í Ísl. Øki. | Munur | |
|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | mió. kr. | mió. kr. | |
| **2004** | 80 | 150 | -71 | til føroyskan fyrimun |
| **2005** | 145 | 115 | 30 | til íslendskan fyrimun |
| **2006** | 227 | 67 | 160 | til íslendskan fyrimun |

# Føroyar eiga at seta egin mál

RÚNI JOENSEN
Formaður í visjónsbólkinum fyri umhvørvi



**Strategibólkurin mælir til, at Føroyar seta egin mál**

**um niðurskurð í útlátinum av veðurlagsgassum, óansæð um Kyotoprotokollin verður havnað ella ikki**

Í seinastuni hava fleiri sett spurnartekin við, hví Føroyar ikki staðfesta Kyoto-protokollina. Serliga hava fjølmiðlar víst á, at strategibólkurin innan umhvørvi í Visjón 2015-arbeiðinum, skal hava mælt til at havna protokollini. Hetta er at gera bólkinum órætt.

Í framløguni hjá bólkinum, sum er at finna á heimasíðuni www. visjon2015.fo verður sagt, at

»setast skulu egin mál um niðurskurð í føroyska útlátinum av veðurlagsgassum«.

At bólkurin so eisini mælir til, at »Landsstýri og løgtingið skulu taka støðu til, um Føroyar skulu taka undir við ella havna Kyoto-protokollini« merkir í roynd og veru, at ein støðutakan er neyðug fyri at vit frameftir kunnu fokusera á arbeiðið at fremja veruligan niðurskurð heldur enn at vera ósamd um, hvørt Kyotoprotokollin skal staðfestast ella ikki.

Eitt annað mál, sum strategibólkurin vísur á, er, at »Føroyar skulu røkja tær skyldur, sum løgtingið og landsstýrið í altjóða og millumtjóða sáttmálum hava bundið okkum til«. Føroyar eru bundnar av veðurlagssáttmálanum.

Tað kann vera, at lítil visión er í hesum málsetningum, og at hetta mest avspeglar týðandi manglar innan fyrisitingina av altjóða avtalum. Hesum er strategibólkurin greiður yvir og hevur tí eisini sett sum mál, at »Í 2015 skulu 2,015% av fíggjarlógini árliga brúkast til at skapa røttu karmarnar fyri vinnulívi, borgarar og myndugleikar, so at vit í felag kunnu arbeiða fram móti somu visjón« sum m. a. skal fevna um ein niðurskurð í føroyska útlátinum av veðurlagsgassum, við ella uttan Kyoto-protokollini.